# Vilja kanna Norrönu-árin

Hetlendski menningargrunnurin fer nú undir seina seks mánaða verkætlan, har ætlanin er at greina ávirkanina, sum Norröna hevur á hetlendska búskapin.

Í fjør gjørdi grunnurin eina fyribils kanning av hesum, og tá varð komið fram til, at siglingin hjá Smyril Line gevur búskapinum har millum 40 og 75 mió kr. um árið.

Kanningin, sum nú verður sett í verk, skal í størri mun nágreina, hvussu hesin peningur ávirkar búskapin. Eitt nú við at finna útav, hvørjar vinnurnar eru, sum serliga merkja ávirkanina.

Formaðurin í hetlandska menningargrunninum, Neil Grant, sigur við Shetland Marine News, at hetta er ein liður í royndunum at fáa enn størri avkast av týdningarmiklu farleiðini.

– Vit vita longu, at hendan rutan hevur stóran búskaparligan týdning fyri oyggjarnar. Nú vilja vit finna útav, hvussu typiska ferðafólkið sær út, soleiðis at vit á tann hátt í enn størri mun kunnu veita málrættaðar tænastur til hesi.

Grunnurin fer nú at søkja eftir fólki at fremja kanningina. Roknað verður við, at talan er um eina verkætlan, sum tekur hálvt ár.

Hetlendski menningargrunnurin hevur tilsamans sett £ 8,9 mió í Smyril Line. Við seinastu kapitalhækkan var grunnurin tó ikki partur av teimum,sum øktu um ognarlutin.

-mærk

# Klaksvík til reiðar at møta møguleikunum við Norðoyatunlinum

**Vinnulívsráðið í Klaksvík hevur sett sær fyri at skorða undir nøkur mál, sum hava stóran týdning fyri Klaksvíkina, nú Norðoyatunnilin letur upp í næstum**

**NORÐOYATUNNIL**
*Vinnulívsráðið í Klaksvík*

Grundleggjandi fyri eini menning í Klaksvík er, at tøk grundøki til eina og hvørja tíð eru til vinnulig og privat endamál. serliga nú vit verða eitt við hin partin av Føroyum.

Tess vegna bað Vinnulívsráðið um fund við býráðið, fyri at fáa avklárað, hvussu støðan er viðvíkjandi grundøkjum.

Í næstum sær út til, at grundøki til ídna verða tøk. Í ár verða níggju grundøki tøk, í 2007 onnur níggju, og sum tað sær út í 2008 og 2009, verða í alt 18 grundstykki til ídna tøk. Men her verður sjálvandi arbeitt við fleiri møguleikum.

Eftir hesi útbyggingarog tíðarætlan, fara at verða góðir møguleikar hjá virkjum og einstaklingum í Klaksvík at fara undir og stovna vinnuvirki.

Hugaligt er eisini at síggja, at havnin í Ánunum hevur fingið eina so góða byrjan, sum higartil er sætt. Her eru stórir møguleikar fyri útbyggingum bæði á sjógvi og á landi.

Handils- og ídnaðarøkið í Klingrugarði er í ár fult útbygt, og kunnu vit frøast um tað virksemi, sum nú fer fram á økinum.

Útstykkingar til sethúsabygging síggja nú aftur út til at fara at taka dik á seg. Fyribils verður roknað við, at býráðið megnar at greiða millum 30 og 40 grundøki árliga komandi 10 árini.

Vinnulívsráðið metir, at meiri ferð eigur at verða sett á útveganina av økjum til skrivstovu- og tænastuvirksemi. Tað fyriliggja ætlanir í býráðnum, sum tó eru komnar ov stutt, men sum nú eru tiknar framaftur.

Um vit – sum fyriliggjandi ætlanir peika á – megna at fáa til vega tey alneyðugu øki til vinnuvirki, sethús og tænastuvirki, sær tað út til, at Klaksvík er til reiðar at møta stóru møguleikunum, nú Norðoyatunnilin gerst veruleiki.




# Les Sosialin so ert tú við


## KROSSORÐ




**Vinnari:**

*Lý Høgnadóttir*
*Bjarnoyarvegur 7 A*
*100 Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: BLÁKOLLAN

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B | Ó | K | H | A | L | D | A | R | I | N | | S | T | Ó | R |
| U | S | | E | | L | I | | | A | I | M | E | E | | E |
| R | A | D | I | S | A | | K | O | N | T | O | N | I | | Y |
| G | | O | M | A | N | L | O | P | | A | | | R | A | Ð |
| A | N | N | A | M | O | S | T | I | R | | A | V | R | I | K |
| R | | | V | | | | | | Á | H | U | G | I | | Á |
| A | U | B | E | R | G | I | N | A | | V | E | | | S | L |
| B | L | A | Ð | S | E | L | L | A | R | Í | | H | | T | |
| O | K | U | R | | V | J | | | O | T | | U | T | A | H |
| L | A | D | A | | A | U | | H | A | L | D | G | Ó | Ð | U |
| L | N | | R | S | | S | S | | L | E | A | | R | | G |
| A | | A | | O | | H | O | | D | Y | G | G | A | | L |
| R | U | G | U | R | | I | | | | K | U | T | | A | O |
| 452 | P | A | S | T | I | N | A | K | K | U | R | | U | R | T |
| S | S | V | | A | A | | N | Ø | T | R | I | L | S | I | |
| K | I | E | L | | N | A | I | N | | | N | A | S | A | R |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

Loysunarorðið: .............................................. **453**

Navn: ..............................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: ....................................................

*Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!*

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** – *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** – *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***